# Greina og Tulka 2019



# Greiningarfrymil til stuttsøgur og skaldsøgur

Byrjan og endi verða viðgjørd í øllum tekstum, men ymiskt er hvørjir partar í bulinum eru viðkomandi fyri ymisku søgurnar.



# 1: Byrjan: Frágreiðing

## Kunning

Heiti, høvundur og tíðarfesting.

## Støða

Hvat (stutt samanfatan av gongdini)

Hvør (týðandi persónar)

Nær (søgutíð)

Hvar (rúm)

# 2: Bulur: Greining og tulking

## Bygnaður

Søgan kann býtast í partar eftir tíð, stað, skift í sjónarhorni ella øðrum.

Ymiskt er, hvussu søgunar eru bygdar, í mun til nær hendingar fara fram. Vanligastu hættirnir eru:

1. Tíðarraðarbygnaður. Gongdin fer fram í tíðarrøð.

2. Tíðarraðarbygnaður við afturlitum og/ella framlitum.

3. Afturlitsbygnaður. Gongdin í søguni er farin fram, áðrenn søgan verður søgd.

Byrjan: Nógvar søgur byrja in medias res (mitt í hendingunum). Tá byrjar søgan uttan fyrst at hava lýst bakgrund hjá persónum ella hendingum. Aðrar søgur lýsa fyrst persónar og bakgrundina hjá teimum og skapa síðani áhuga fyri, hvussu teir mennast í søguni.

## Mál og stílur.

Stílurin í einari søgu kann vera skemtiligur, álvarssamur, gerandisligur, hátíðarligur ella annað. Tað er málið, ið skapar stílin.

Til at lýsa stílin kann verða hugt eftir orðavali og myndamáli.

Mál og stílur kunnu skapa eitt ávíst huglag í einari søgu, t.d. dapurt, hugnaligt ella ironiskt.

## Tíð, rúm og umhvørvi

Gongdin í søgum kann verða sett inn í tíð og rúm.

Søgutíð er tíðin, tá ið hendingarnar fara fram.

Frásagnartíð verður brúkt um tíðina, tá ið søgan verður søgd. Tá søgan verður fortald.

Eftir at hendingarnar eru farnar fram, tosa vit um afturlit.

Verður søgan fortald samstundis sum hendingarnar, nevna vit tað medlit.

Rúm/umhvørvi kann vera úti/ inni, býur/bygd, burtur/heima o.s.v., og sosiala umhvørvið kann vera ríkt/ fátækt, heimligt/fremmant o.s.v.

## Tema

Tema í tekstum kunnu verða orðað heilt stutt, í einum orði sum til dømis:

Kærleiki

Stættarmunur

Deyði.

Tey kunnu eisini verða sett upp sum mótsetningar sum til dømis:

Rík – fátøk

Lív – deyði

Kærleiki - hatur.

## Persónslýsing

Persónslýsing kann verða skipað soleiðis:

Aldur, útsjónd, sosial bakgrund, verumáti, lyndi, førleikar, stutt niðurstøða.

Mett kann verða um, um persónslýsingarnar í søguni eru trúligar ella ikki.

Beinleiðis persónslýsing: frásøgufólkið greiðir beinleiðis frá persóninum, til dømis útsjónd og lívssøga.

Óbeinleiðis persónslýsing: persónarnir verða lýstir gjøgnum tað, sum teir hugsa, siga og gera

## Myndamál

Nógvar søgur kunnu lesast í fláum. Veruleikaflógvin er tað, sum ítøkiliga gongur fyri seg í tekstinum. Myndaflógvin gevur við myndamáli veruleikaflónni dýpd og leggur upp til tulkingar.

Dømi um myndamál:
Samanbering: Fyribrigdi sett hvørt móti øðrum við sambindingarorðum (sum, líkasum og eins og) t.d. „vøkur sum ein rósa".

Metaforar: Samanberingar, har sambindingarorðið er tikið burtur. T.d „Bilurin er ein kosmiskur pausudropi"

Persónsgerð: Óítøkilig hugtøk gerast ítøkilig og fáa menniskjansligar eginleikar.

Sálarkveiking: Ítøkilig náttúrufyribrigdi og deyðir lutir fáa menniskjansligar eginleikar, t.d. búkurin ger uppreistur.

## Sjónarhorn

Innara sjónarhorn: Søgan sædd gjøgnum eyguni hjá ávísum persóni í 1. ella 3. persóni. Lesarin kennir hugsanir hjá frásøgufólkinum.

Uttara sjónarhorn: Frásøgufólk sigur tað, ið kann síggjast og hoyrast. Lesarin fær ikki at vita, hvat persónarnir hugsa.

Alvitandi frásøgufólk: Veit um tankar og kenslur hjá persónunum og um hendingar, ið eingin annar veit nakað um og kann ferðast í tíð

# 3: Endi, samanfatan og perspektivering

## Útsøgn

Hvat sigur teksturin um tema, hvørja hugsan fær lesarin um persónar, hendingar og annað, hvørjum heldur lesarin við?

## Menniskjafatan, virði

Hvør menniskjafatan og/ella samfelagsfatan kemur fram í søguni? Hvørji virði leggur søgan dent á, og hvat metir teksturin vera rætt og skeivt. Hesi kunnu verða sett í søguligt/landafrøðiligt/politiskt/ átrúnaðarligt høpi.